FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

**Svar upp á**

**skrivligan fyrispurning nr. 41/2015 eftir tingskipanini § 52a frá Jørgen Niclasen, løgtingsmanni, um hvat akfør rinda og hvat veganetið kostar**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Hvussu nógv rinda akfør í skrásetingargjaldi, vegskatti, bensin- og dieselgjaldi og MVG av brennievni? Best um svarið varð útgreinað.
2. Hvussu nógv brúkar landsstýrið til viðlíkahald og íløgur í veganetið í ár.
3. Ætlar landsstýrismaðurin í fíggjarmálum at fáa javnvág millum hesar inntøkur og útreiðslur.

**Svar:**

**Til spurning 1**
Roknað verður við, at talan verður um samanlagt 360 mió. kr. í 2016. Roknað verður við 145 mió. kr. í skrásetingargjaldi, 107 mió. kr. í vektgjaldi og 108 mió. kr. í MVG og øðrum avgjøldum á bensin og diesel.

**Til spurning 2**
Rakstrarjáttanin til landsvegahaldið er 42,8 mió kr. í ár., sum er til at reka og røkja landsvegirnar, herímillum eisini tunlar og brýr. Vanligt viðlíkahald verður á leið 28,0 mió kr. Vetrarhaldið er leystliga mett til 10 mió kr., umframt umleið 5 mió. kr. samanlagt til fyrisiting, ferðsluteljingar, planlegging og annað.

Samanlagt verða eftir ætlan, umleið 76,2 mió kr. brúktar til íløgur í landsvegir í 2016. Tað eru játtaðar 61,5 mió kr. til íløgur í landsvegir í ár og harumframt eru 14,7 mió. kr. fluttar fram frá undanfarnum árum (støðlaðar).

**Til spurning 3**
Nevndu avgjøld eru – eins og flestu onnur avgjøld - ikki oyramerkt til nakað ávíst endamál. Tí ber ikki til at tosa um ójavnvág.  Um farið varð yvir til at oyramerkja inntøkur landsins til ávís endamál, hevði hetta kravt eina grundleggjandi broyting, og hevði landshúsarhaldið tá skjótt borið bráð av, at verið ein rúgva av ymiskum "cigarkassum". Hetta minnir um sokallaðu "grunnarnar" í 1980'unum. Mælt verður frá hesum.

Staðfestast kann hartil, at avgjøldini eru ein týðandi partur av landsins inntøkum, og at tey eru við til at tryggja, at landið kann fíggja sínar tænastur uttan at lønarskatturin gerst ov høgur. Samgongan hevur lagt stóran dent á, at skattatrýstið á vanliga lønarinntøku varð lækkað, og

hevur tí sett í verk skattalætta á samanlagdar 137 mió. kr. til lág- og miðallønt frá 1. januar 2016.

Eisini eru vert at hava í huga, at verður samanborið við grannalondini eru samlaðu avgjøldini á akfør og brennievni ikki høg í Føroyum.

Leggjast kann afturat, at í heyst verður uppskot um umlegging av vektgjaldinum (vegskattinum) lagt fyri Løgtingið. Ætlanin er, at farið verður frá, at vektgjaldið verður ásett út frá vekt á akfarinum og útfrá um akfarið nýtir bensin ella diesel. Í staðin fer vegskatturin at verða tengdur at, hvussu nógv akfarið dálkar umhvørvið.

Fíggjarmálaráðið, 21 apríl 2016

**Kristina Háfoss,**
landsstýriskvinna